
Leikrit




Teir tríggir vísmenninir



Landsmiðstøðin

TEIR TRíGGIR VíSMENNINIR.



KLOKKAN RINGIR.....

MEÐAN KLOKKAN RINGIR STANDA EINGLARNIR INNI í KÓR, BEINT FRAMMAN FYRI ALTARRINGINUM. JÓSEF, MARIA OG KRUBBAN VIÐ JESUS-BARNINUM ERU INNI í ALTARRINGINUM.
EINGLARNIR SYNGJA SAMAN VIÐ FLOYTUSPÆLI:

Nú ringja kirkjuklokkur so hátt
við himmalskum gleðiljóði:
Tað stundar móti jólanátt,
tá Jesus var føddur hin góði.

Øll ung og gomul, samlist nú brátt
og lýðið á gleðiljóði:
Tað var um halgu jólanátt,
at Jesus var føddur hin góði.

INNGANGSBØNIN VERÐUR LISIN.....

EIN RØDD LESUR JÓLAEVANGELIIÐ, MEÐAN SANGUR OG TÓNLEIKUR ER AFTANFYRI. TÁ RØDDIN ER KOMIN TIL:..átti son sín..(Luk.2,7) FARA EINGLARNIR TIL SÍÐIS, SO AT ÁSKOÐARARNIR KUNNU SÍGGJA JÓSEF, MARIU OG KRUBBUNA.

1. SANGUR : Her koma, Jesus, tíni smá.....

TÁ KOMIÐ ER TIL NÆSTA ØRINDI FARA EINGLARNIR ÚT.
TÁ KOMIÐ ER TIL NÆSTSEINASTA ØRINDI KOMA VíSMENNINIR INN í KÓR.
VIT ERU í EYSTURLONDUM. VíSMENNINIR KANNA STJØRNUHIMMALIN.

Baltazar : Aftur ein frálíkur stjørnuhimmal.

Kaspar : Ja, hann er enn betri enn í gjár.

Baltazar : í nátt fáa vit heilt neyvar uppmátingar.

TÓNLEIKUR-

Melchior : Har er ein stjørna, sum ikki var í gjár!

Kaspar : Ein halastjørna! Hyggið!

Baltazar : Hvar hevur tú hana?

Melchior : Har!

Baltazar : Ja, eg siggi hana.

Kaspar : Hatta er ikki ein halastjørna!

Baltazar : Hon stendur heilt still.

Kaspar : Hon flytur seg ikki.

Baltazar : Ein stjørna.

Melchior : Enn bjartari enn allar hinar stjørnurnar á himmalinum.

TÓNLEIKUR-

Kaspar : Men hvussu kann ein stjørna vera har, tá ongin var í gjár?

Melchior : Tað má vera eitt tekin frá Gudi.

Kaspar : Eg fái meg ikki at trúgva upp á Gud.

Melchior : Hví ikki?

Kaspar : Mítt vit sigur mær tað.

Baltazar : Á, ikki annað?

Melchior : Hatta var ikki vakurt sagt! Tú veitst sjálvur, hvussu fínar kanningar, ið Kaspar hevur gjørt. Hevur tú gloymt, at tað var hann, sum roknaði út nær Orion fyrstu ferð skuldi siggjast á himmalinum í ár?

Baltazar : Eg hugsaði ikki bert um Kaspar, men eisini um títt og mítt vit. Vit máta upp og rokna út. Vit vita meira um stjørnurnar enn øll onnur í Eysturlondum. Men hvat er tað í móti øllum tí, sum til er? Vit siga frá stjørnum, men onki menniskja kann siga frá tí ófatiliga. At vit eru til! At rúmdin er til! At jørðin er til!

Melchior : Stjørnan lýsir við sama ljóma.

Baltazar : Og tú heldur, at tað er eitt tekin frá Gudi? Er ikki hvør blóma á markini, hvør fuglur í haganum, hvør stjørna á himmalinum eitt tekin um tað, sum vit ikki skilja? Vakurt er tað, sum vit siggja. Vakrari er tað, sum vit viðurkenna, men vakrast er alt tað, sum vit ikki fata.

Melchior : Eg haldi, at henda stjørnan ber boð um, at okkurt stórt er hent.

MELCHIOR HYGGUR UPP MÓTI STJØRNUNI.

Melchior : Hon kann bert bera boð um, at ein kongur er føddur.

Kaspar : So má hon standa yvir Egyptalandi! .... Nei tað ger hon ikki. Hon er ikki so langt suðuri.

Baltazar : Hon kundi staðið yvir Kánaans landi. Har sum gýðingarnir fóru inn.

Kaspar : Yvir Jerúsalem?

Baltazar : Tað er torført at siga, her frá sum vit siggja.

Melchior : (HYGGUR UPP MÓTI STJØRNUNI) Gud gevur okkum ikki eitt tekin, bert fyri at vit skulu siggja!

Kaspar : Hvat meira kunnu vit gera, enn at siggja, og at skriva niður?

Melchior : Vit skulu fylgja stjørnuni!

Kaspar : Hví skulu vit tað?

Melchior : Fyri at heilsa tí stóra konginum, sum føddur er.

Kaspar : Ja, um tit halda tað, so kunnu vit fara avstað. So kunnu vit siga frá tí, sum vit hava sæð.

Baltazar : Vit mugu hava gávur við okkum! Eg taki myrru.


Melchior : Eg fari at heilsa honum við roykilsi.

Kaspar : Frá mær skal hann fáa gull.

Melchior : Vit fara avstað beinan vegin.

Kaspar : Nú í nátt?

Baltazar : Ja, vit eru vanir at vera uppi um næturnar.



2. SANGUR : Fagur himin er at sjá.....(v. 1 - 4)

TÁ KOMIÐ ER TIL 2. ØRINDI FARA VÍSMENNINIR ÚT.
TÁ KOMIÐ ER TIL 4. ØRINDI KOMA HIRÐARNIR FRAM Á KÓRSGATTINA.
HIRÐARNIR ERU Á MARKINI OG ANSA EFTIR SEYÐI.

Sámuel : Hvussu stendur til við lambinum, sum reiv seg av tornarunninum?

Mattias : Eg hugsi ikki, at tað hevur tikið ilt fyri seg.

Natanael : Eg hugdi at beininum. Sárið sær út til at lekjast væl.

Sámuel : Hví skulu seyðirnir altíð fara tvørtur um hasa grýtutu brekkuna?

Mattias : Eg veit ikki. Eg havi mangan roynt at fingið teir at farið uttanum, men tað sær út til, at teir vilja bert handa vegin! (PEIKAR).

Natanael : Í morgin haldi eg, at eg farið at fylla leirkrukkuna í kelduni hinu megin gjónna.

Sámuel : Skuldi tað vatnið verið betri enn tað úr fjallaánni?

Natanael : Nei, kanska ikki. Men eg farið at royna kortini.

Sámuel : Tað var gott, at tú fekst tjóðrað hatta lambið, sum vit mistu burtur.

Natanael : Eg eri eisini móður.

NATANAEL GEISPAR OG SOVNAR - TÓNLEIKUR -

Mattias : Á, sum náttin er vøkur!

Sámuel : Ja, men nú fer at lota.

Mattias : Eg merki ongan vind!

Sámuel : Nei, tað geri eg heldur ikki, men hoyrir tú ikki vindin langt har uppi?

TEIR LURTA - - -

Mattias : Tað ljóðar sum veingir á luftini!

Sámuel : Men ongir flytifuglar eru hesa tíðina á árinum.

Mattias : Lurta!

EINLARNIR KOMA INN SYNGJANDI SAMAN VIÐ FLOYTUSPÆLI:

Komið, allir seyðahirðar,
óttist ikki, komið higar.
Himna kongason í nátt
hevur væna jomfrú átt.
Krubbustrá, ásnum hjá
Frelsarin var lagdur á.

NATANAEL VAKNAR AV SANGINUM.

1. eingil : óttist ikki; tí sí, eg kunngeri tykkum eini stór gleðiboð, sum skulu verða fyri alt fólkið. Tí at tykkum er í dag ein frelsari føddur, sum er Harrin Kristus í Dávids staði! Og hetta skulu tit hava til merkis: "Tit skulu finna eitt barn reivað og liggjandi í eini krubbu."

2. eingil : Heiður veri Gudi!

Einglarnir: Heiður veri Gudi í hægsta himli!

1. eingil : Friður á jørð!

Einglarnir: Á jørðini friður!

1. eingil : Og í menniskjum góður tokki!

Einglarnir: Heiður veri Gudi!

FLOYTUSPÆL - EINGLARNIR FARA OG HIRÐARNIR REISA SEG.

Natanael : Sóu tit teir eisini? Hoyrdu tit teir?

Sámuel : Ja!

Natanael : So var tað ikki ein dreymur meðni!

Mattias : Vóru teir virkuliga her?

Sámuel : Ja!


Mattias : So mugu vit fara til Betlehems at síggja tað, sum hent er og sum varð kunngjørt okkum.

Sámuel : Vit kunnu ikki allir tríggir fara til Betlehems. Onkur má vera her.

Natanael : Vit kundu tikið seyðin við okkum.

Mattias : Ja, lat okkum gera tað.

Sámuel : Kom, lat okkum fara avstað!



3. SANGUR : í Betlehem í Dávids stað.....

VIT ERU í BETLEHEM. TELJARIN STENDUR OG TELUR. HIRÐARNIR STANDA HJÁ HONUM.

Teljarin : Hey tit!

Teljarin : Eru tað tit, sum hava havt eitt seyðafylgi við og slept tí inn um býargirðingina? Tað er fyri neyðini, at eg ikki skal telja seyðin eisini.

Sámuel : Ja, vit hava eini ørindi her í Betlehem.

Teljarin : Tit skulu teljast, ha?

Natanael : Nei, vit vilja bert finna....

Teljarin : Sjálvandi skulu tit teljast. Augustus keisari hevur givið boð um, at allur heimurin skal skrivast í manntal.

Mattias : Jú, men vit eru á veg fyri at....

Teljarin : Ja, og tað má haldast at vera rætt, at fólk ferðast til mynduleikarnar og ikki øvugt.

Sámuel : Men....

Teljarin : Ella kanska er tað okkara klóki landshøvdingi Kvirinius, sum hevur tikið hesa avgerð. Prísaður verði hann, um so er. Øll skulu fara til tann bý, tey eru ættaði úr og har verða tey tald. Eg telji tykkum her í Betlehem.

Natanael : Skilir nakar, at Augustus keisari kann hava á-huga fyri, um vit eru fleiri ella færri?

Teljarin : Jú, og lat meg nú skriva tykkum upp. Navn?

Mattias : Mattias.

Teljarin : Starv?

Mattias : Seyðamaður.

Teljarin : (SKRIVAR EINA STRIKU) Ja, og næsti.

Natanael : Natanael.

Teljarin : Starv?

Natanael : Seyðamaður.

Teljarin : Og tú?

Sámuel : Sámuel.

Teljarin : Starv?

Sámuel : Seyðamaður.

Teljarin : (SKRIVAR STRIKUR) Ja, so eru tit taldir. Sleppið tykkum nú aftur til seyðin.


Natanael : Ja, men vit hava eini ørindi í Betlehem!

Teljarin : Hvørji onnur ørindi hava tit uttan at verða taldir?

Sámuel : Vit skulu finna eitt barn. Eitt nýføtt barn, reivað og liggjandi í eini krubbu.

Teljarin : Á nei, tit siga ikki, at børn eisini verða fødd her! Ikki meðan vit telja. Høvdu Augustus og Kvirinius bert vita, hvat fyri knoss teir hava givið okkum.

TELJARIN FER AVSTAÐ, MEÐAN HANN RISTIR VIÐ HØVDINUM.



4. SANGUR : Eitt barn er føtt í Betlehem....(1.- 5.ø.)

TEIR TRIGGIR SEYÐAMENNINIR KOMA TIL VERTSKONUNA Á GISTINGARHÚSINUM.

Vertskonan : Hvat vilja tit?

Natanael : Vit vildu fegin vita....

Vertskonan: Her er einki pláss.

Sámuel : Vit ætlaðu bert at spyrja....

Vertskonan: Eg sigi, at her er onki pláss. Skilja tit onki? Her havi eg runnið í allan dag, eg eri so deyðamóð.

Mattias : Vit ætla okkum ikki at gista her.

Vertskonan: Hvat vilja tit tá?

Sámuel : Vit leita eftir einum nýføddum barni. Reivað og liggjandi í eini krubbu.

Vertskonan: Krubbu? So mugu tit fara yvir í fjósið. Onkur býr har, tað veit eg. Vit áttu at tikið pengar afturfyri, tí tey fáa hita frá kríatúrunum. Tað kann vera, at eitt barn er har. Nú eg hugsi um tað, so var ein kvinna har, sum sá út til at føða hvørja løtu.

HIRÐARNIR FARA Í FJÓSIÐ.



5. SANGUR : Eitt fjós og ein krubba....

Natanael : Tað ber ikki til, at vit skulu leita í einum fjósið!

Sámuel : Krubba og fjós hóska saman.

Mattias : Jú men, eitt vanligt fjós!

Sámuel : Kunnu vit koma inn?

Jósef : Ja, gerið so væl. (HIRÐARNIR KOMA INN) Tit eru hirðar, koma tit eftir seyði kanska?

Natanael : Nei, tað vóru ikki ørindi okkara. Vit leita eftir einum lítlum barni. Reivað og liggjandi í eini krubbu.

Jósef : Vek ikki barnið.

Maria : Eg havi beint nú givið honum og hann er sovnaður.

Sámuel : (VIÐ HINAR HIRÐARNAR) Er hetta tað, sum vit eru

komnir heilt til Betlehems at siggja, eitt fátækt barn? Eina fátæka konu?

Natanael : Vit hirðar siggja ivaleyst av fátækum børnum heima. Tað er ikki neyðugt at fara heilt til Betlehems til tess.

LJÓÐ AV EINGLUM (hetta verður spælt av bandi!):

EINGLARNIR SYNGJA SAMAN VIÐ FLOYTUSPÆLI:

So milt lýsir stjørnan,
so skínandi ljós,
hon lýsir á krubbu
og fátæka fjós.
Sí, har hvílir Jesus
á beði av strá,
hann gleði ber øllum,
ið har eru hjá.

1. eingil : óttist ikki; tí sí, eg kunngeri tykkum eini stór gleðiboð, sum skulu vera fyri alt fólkið. Tí at tykkum er í dag ein frelsari føddur, sum er Harrin Kristus í Dávids staði! Og hetta skulu tit hava til merkis: "Tit skulu finna eitt barn, reivað og liggjandi í eini krubbu."

2. eingil : Heiður veri Gudi.

Einglarnir: Heiður veri Gudi í hægsta himli.

1. eingil : Friður á jørð.

Einglarnir: Á jørðini friður!

1. eingil : Og í menniskjum góður tokki.

Einglarnir: Heiður veri Gudi.

Natanael : (VIÐ JÓSEF OG MARIU) Hoyrdu tit eisini?

Jósef og Maria : Ja (TEY SMILAST).

Mattias : Hin hægsti er ímillum okkum.

HIRÐARNIR LEGGJAST Á KNÆ, REISA SEG SÍÐAN AFTUR.

Sámuel : Lat okkum fara. Vit mugu kunngera hesi tíðindi fyri øllum.

HIRÐARNIR FARA ÚT ÚR ALTARRINGINUM.



6. SANGUR : Føgur er foldin.....

VÍSMENNINIR KOMA.

Melchior : Yvir hesum lítla býnum stendur stjørnan.

Kaspar : Ikki yvir Jerúsalem, men yvir einum lítlum býi í Júdeu. Tað var marghættligt!

Baltazar : Sjálvt hitt største træið í Libanon er vaksið av einum lítlum fræi. Kann tá heimsins størsti kongur ikki vera føddur í einari bygd?

HIRÐAR OG VÍSMENN MØTAST.

Baltazar : Hvussu eitur hesin býurin, sum vit siggja fyri framman?

Mattias : Betlehem.

Melchior : So vita tit kanska, um ein kongur er føddur har?

Natanael : Ja, hin størsti í heiminum!

Sámuel : Vit eru á veg fyri at kunngera hesi gleðiboðini fyri øllum.

Mattias : Men, hvussu ber tað til, at tit vita um hetta?

Melchior : Vit sóu eina stjørnu lýsa yvir Kánaans landi. Henni hava vit fylgt.

Kaspar : Hon hevur ført okkum higar.

Baltazar : Hvar finna vit henda kongin?

Kaspar : Eg siggi onga kongaborg!

Natanael : Barnið er ikki at finna á nakrari kongaborg, men í einum fjósi!

Kaspar : í einum fjósi?

Baltazar : Tú, sum veitst so nógv, hevur tú onki fatað? Hví ikki í einum fjósi? (VIÐ HIRÐARNAR) Vita tit, hvar fjósið er?

MATTIAS VÍSIR TEIMUM Á FJÓSIÐ.

Baltazar : Vit fara hagar!

Sámuel : Og vit fara út um heimin at kunngera gleðiboðini.

VÍSMENNINIR KOMA TIL FJÓSIÐ - TÓNLEIKUR.

Baltazar : Kunnu vit koma inn?

Jósef : (NIKKAR).

KASPAR LEGGUR SEG Á KNÆ FRAMMAN FYRI KRUBBUNI.

Kaspar : Almáttugi Gud, heimsins kongur! Mín gáva til tín skal vera tað reina gull. Gev okkum frið!

MELCHIOR LEGGUR SEG Á KNÆ FRAMMAN FYRI KRUBBUNI.

Melchior : Tú lítla barn, av hægsta himli. Teg vil eg æra við vælangandi roykilsi. Úr londum langt higani koma vit til tín. Lyft tú tína ásjón yvir okkum og gev okkum frið.

BALTAZAR LEGGUR SEG Á KNÆ FRAMMAN FYRI KRUBBUNI.

Baltazar : Mín frelsari. Eg gevi tær myrru til tína jarðarferð. Gævi, at vit í henni kunnu hóma gátuna í tíni uppreisn. Tú, sum ert vegurin, sannleikin og lívið! Tú, sum ert kærleiki.

VIÐ ORGUL- OG FLOYTUSPÆLI KOMA EINGLARNIR INN OG ALLIR LEIKARARNIR STANDA INNI Í KÓR BEINT FRAMMAN FYRI ALTARRINGINUM.

7. SANGUR : Gleðilig jól.....

ÚTGANGSBØNIN VERÐUR LISIN.....

KLOKKAN RINGIR.....

POSTLUDIUM.....

